# ÍTRÓTTUR

ÍTRÓTTUR
TEITUR JOENSEN
TEITUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*- Til tíðir helt eg, at vit ræddust tær. Ninna K. Johansen, StÍF*

Stjørnan-StÍF 36-22 (15-9)

# Stjørnan vann stórt

**Stjørnan vann stórsigur í Sunset deildini hjá kvinnum, tá StÍF var á vitjan. Við sigrinum hevur Stjørnan lagt sjógv niður til næstu liðini.**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialrin.fo*

Hóskvøldið var dystur í KÍ-høllini, har oddaliðið í bestu kvinnudeildini í hodbólti, Stjørnan, tók ímóti StÍF, sum undan dystinum lá á næstaftasta plássi. Júst hesi bæði liðini møttust eisini í næsta dystinum í hesum kappingarárinum, og ta ferðina vann Stjørnan tepurt, eftir at StÍF hevði ført langt út í seinna hálvleik. Nú var tíðin komin hjá Stjørnuni at seta strandakvinnur uppá pláss.

**Stjørnan flúgvandi byrjan**

Og tað gjørdu tær so sanniliga eisini. Tær ruku avstað, og StÍF fekk einki mál fyrrenn í 6. minutti, og tá hevði Stjørnan longu skora fýra ferðir. Sum hálvleikurin leið økti Stjørnan enn meir um leiðsluna, og tá 18 minuttir vóru farnir, var støðan 10-3 til heimaliðið. Restina av hálvleikinum var gongdin heldur javnari, og tá liðini fóru til hálvleiks var støðan 15-9 til Stjørnuna, sum var nógv tað betra liðið í fyrra hálvleiki.

**Leiðslan bara øktist**

Stjørnan helt á fram í seinna hálvleiki, har tær høvdu slept í fyrra. Fyrstu løtuna royndi StÍF at hanga í, men so glapp. 20 minuttir inn í seinna hálvleik hevði Stjørnan økt enn meir um leiðsluna, og nú var støðan knapliga 33-14 til Stjørnuna. Hesa løtua hevði Stjørnan fingið 11 mál í 9 minuttir, meðan StÍF einki mál hevði fingið, og nú lá líka sum í luftini, at hesin dysturin kundi enda við sorli.

Síðstu 10-12 minuttirnar valdi Stjørnan tó at taka flestu av berandi kreftunum út, og í staðin fingu fleiri av ungu leikarunum møguleikanum. Hetta gagnnýtti StÍF, og síðstu løtua megnaðu tær eisini at pynta um úrslitið.

Endaliga støðan gjørdist 36-22 til Stjørnuna, og við sigrinum hava tær økt um munin niður til nærmastu liðini, sum tó hava leikt ein dyst færri. StÍF verður við tapinum verandi á næstaftasta plássi.




*Stjørnan vann stórsigur á StÍF í gjárkvøldi. Við sigrinum hevur Stjørnan økt um munin niður til næstu liðini.*

## - Vit vóru nógv betri

Eftir dystin fingu vit orðið á venjaran hjá Stjørnuni, Henrik Gerster. Hann var sera glaður fyri trygga sigurin ímóti StÍF.

- Hetta var deiligt. Vit eru nógv betri enn tær í dag, og í stórum pørtum av dystinum trumla vit tær niður. Eg haldi, at vit eru nógv betri fyri kropsliga enn tær, og so tykist tað, sum vit orka betri í dag. Síðstu 10-12 minuttirnar spæla vit við einum blaðungum liðið, og eg haldi tað vera stuttligt, at hesar sluppa at royna seg í dag. Annars haldi eg, at allir leikararnir vístu gott spæl í dag, so hetta var ein ræ. ttur liðinnsatsur.

## - Eg haldi, vit ræddust tær

Eftir dystin fingu vit eisini orðið á Ninnu K. Johansen hjá StÍF. Hon var ikki nøgd við innsatsin og helt, at leikararnir helst vóru í so bangnar.

- Hetta var ikki gott. Vit blivu snøgt sagt hølvaðar av í dag. Einki riggar hjá okkum. Vit renna ikki fyri hvørji aðrari, og til tíðir helt eg, at vit ræddust tær. Eg haldi tó, at tær spældu ótrúliga væl, og vit taptu ímóti einum nógv betri liðið í dag. Nú mugu vit bara royna at gloyma henda dystin og koma víðari, tí vit kunnu ikki taka nakað víðari frá hesum dystinum.

## FAKTA

**Stjørnan-StÍF 36-22 (15-9)**

**Málskjúttar:**
**Stjørnan:** Joan Djordjevic 7, Una Olsen 6, Alina Olaru 4 (3), Durita Mikkelsen 4, Bára S. Klakstein 4, Hanna Mikkelsen 3, Anna Kristina Samson 3, Durita Christophersen 2, Simona Petersen 2, Maria við Neyst 1
**StÍF:** Ninna K. Johansen 5 (1), Poula D. Olsen 5, Rebekka Justinussen 4 (1), Ata Gregersen 3, Sólfríð Christiansen 2, manglar okkurt

**Brotskøst:** Stjørnan 3, StÍF 2
**Útvísingar:** Stjørnan 1, StÍF 3
**Dómarar:** Ragnar Simonsen & Rúni Mohr

# Vágaliðini mugu halda fast

**Hjá bæði Drátti og SÍ ræður um at halda fast í oddinum í meistaradeildini hjá kvinnum, tá tær møta ávikavist KÍF og Mjølni.**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Árið í ár hevur verið gott hjá báðum vágaliðunum í meistaradeildini hjá kvinnum. Dráttur liggur í førarafeltinum saman við TB og ÍF, meðan SÍ liggur beint í hølunum á teimum við 10 stigum. Leygardagin skulu hesi bæði liðini í dyst ímóti botnliðunum.

**Dráttur skal í gongd aftur**

Á Giljanesi fær Dráttur vitjan av KÍF. Gongdin hjá Drátti hevur verið alt annað enn góð síðstu dystirnar. Síðsta vikuskiftið blivu tær hølvaðar av í Trongisvági, og undan tí dystinum høvdu tær tapt á heimavølli fyri botnliðnum, Mjølni. KÍF sær hinvegin út til at hava fingið vind aftur í seglini. Eftir sjey tap á rað vunnu tær aftur seinast, tá tær møttu Mjølnir í Klaksvík, so dysturin á Giljanesi kann blíva sera spennandi.

**SÍ er flúgvandi**

SÍ skal til Klaksvíkar at møta Mjølni. Gongdin hjá SÍ hevur verið sera góð í seinastuni. Síðstu tveir dystirnar hava tær vunnið á bæði Drátti og TB, og við spælinum, sum tær hava víst síðstu dystirnar, so er ilt at meta um, hvat av hinum liðunum megnar at steðga teimum í løtuni.

Tær mugu í øllum førum metast sum stórir favorittar í dystinum ímóti Mjølni.